Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting: 21. september 2023
Mál nr.: 23/07005
Málsviðgjørt: BH/OYS

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 19. Stuðulsupphæddirnar sbrt. §§ 7-12 verða tann 1. august á hvørjum ári javnaðar við prosentvísu broytingini í miðalprístalinum fyri undanfarna ár í mun til miðalprístalið fyri árið undan hesum. Tó verða nevndu stuðulsupphæddir ikki javnaðar 1. august 2017. *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð javnaðu lestrarstuðulsupphæddirnar sbrt. §§ 7-12 í seinasta lagi 1. august á hvørjum ári, fyrstu ferð 1. august 2008.	**1.** § 19 verður orðað soleiðis: "Stuðulsupphæddirnar sbrt. §§ 7-12 verða tann 1. januar á hvørjum ári javnaðar. *Stk. 2.* Javningarprosentið fyri komandi árið verður útroknað sum miðaltalið av: 1) prosentvísu broytingini í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í tólv mánaða skeiðnum, sum endaði 1. oktober í verandi ári, og 2) prosentvísu broytingini í brúkaraprístalinum fyri mai í verandi ári, í mun til mai árið fyri. *Stk. 3.* Er roknaða javningarprosentið hægri enn prosentvísa broytingin í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum, verður javningarprosentið sett til

	prosentvísu broytingina í lønarkarminum. *Stk. 4*. Um prosentvísa broytingin í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum er fyri styttri tíðarskeið enn tólv mánaða skeiðið sbrt. stk. 2, nr. 1, verður hetta tíðarskeiðið nýtt. *Stk. 5*. Er roknaða javningarprosentið minni enn null, verður javningarprosentið sett til null. *Stk. 6.* Javning eftir hesum ásetingum fer fram fyrstu ferð tann 1. januar 2025, og eftir hetta verður javnað tann 1. januar á hvørjum ári. Javnað verður ikki tann 1. august 2024 eftir áður galdandi reglum. *Stk. 7.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um javningarprosentið og javnaðu stuðulsupphæddirnar sbrt. §§ 7-12.”